HOYVÍKSHØLLIN
DYSTARSKRÁ 7 / 2022

H71

SUNNUDAGUR
27. MARS

2. HÁLVFINALA:

KVINNUR

KL.14.00: H71-Stjørnan

MENN

KL.16.00: H71-TK

sms
SUÐUROYAR SPARIKASSI
J&K
WENZEL.FO
BONUS
INTERSPORT
BYGMA
TRYGD
ADVOKATFELAGIÐ

Mynd: Hilmar Jan Hansen

HILMAR JAN HANSEN

H71 FER KANSKA IKKI AFTUR ÚT Í EUROPA

Nógv bendir á, at heimadysturin í EHF Europa Cup-kappingini hjá H71-kvinnunum ímóti ukrainska HC Galychanka Lviv, sum var tann sjeyndi á rað hjá teimum, eisini verður tann seinasti europeiski dysturin hjá H71.

– Vit eru bara møtt av rotinskapi í EHF, ið als ikki hevur víst vilja ella áhuga at hjálpa okkum í málinum um útidystin hjá okkara kvinnum ímóti HC Galychanka Lviv. Og heimligu myndugleikarnir hava bara stungið halan millum beinini og ikki verið okkum til nakra hjálp – hvørki moralskt ella fíggjarliga, sigur Anna Dam, forkvinna í H71.

Nú er mestsum endaliga greitt, at H71-kvinnurnar ikki fara at spæla meira av europeiskum hondbólti í ár, tí í vikuni fekk H71 enn einaferð eitt svar frá EHF, ið gongur ímóti sjónarmiðunum hjá felagnum.

Upprunaliga varð H71 av aganevndini hjá EHF tann 4. mars 2022 dømt at tapa útidystin, ið ongantíð varð spældur, 10-0. Samstundis fekk H71 eina treytaða bót upp á 52.000 krónur, ið skal gjaldast, um H71 ger “eitt líknandi brot” næstu tvey árini. Somuleiðis skal H71 rinda ukrainska HC Galychanka Lviv og EHF tær útreiðslur, hesi mugu metast at hava havt av, at H71 ikki møtti til dystin í Ukraina.

H71 kærdi úrskurðin tann 10. mars 2022, men hevur í vikuni altso fingið boð um, at ta fyrru avgerðina hevur ein kærunevnd hjá EHF staðfest mikudagin 23. mars 2022.

– Í kærunevndini sita ein polendingur, ein serbi og ein ungari, so hetta minnir ikki sørt um Grand Prix-kappingarnar hjá Eurovision, har alt vendi á høvdið, tá ið tey eystureuropeisku londini komu uppí, tí tey treytaleyst stuðlaðu sínum grannum. Tað er á leið somu uppliving, ið vit hava av hvussu málið er viðgjørt, tí hetta eru reinar "copy & paste"-avgerðir, ið slett ikki fyrihalda seg til tað, sum er veruliga innihaldið í málinum, sigur Anna Dam, forkvinna í H71.

– Reint juridiskt eru vit vís í, at vit hava eina sera góða sak, tí vit kundu vísa á og skjalprógva, at munur varð gjørdur á okkum og størri feløgum í somu støðu. Men hetta snýr seg nógv meira um politikk enn hondbólt, og tí hava vit fingið eina politiska avgerð, sum skal gera tað lættari hjá EHF at koma víðari við kappingini.

Anna Dam sigur, at tey í felagnum hava tosað við norðurlendingar, ið eru ovarlaga í bæði hondbólts- og ítróttarhøpi yvirhøvur, og eingin skilir tær niðurstøður, EHF er komið við.

– Okkara einasta ætlan hevur verið, at kvinnurnar skuldu sleppa at spæla sínar dystir, men tað er líkasum ikki við í líkningini hjá EHF, ið týðiliga hevur givið til kennar, at smá feløg í europeiska útjaðaranum ikki skulu vænta sær nakrar serligar sømdir frá EHF.

Svikin av UMMR

At H71 kann kenna seg svikið av EHF er eitt, ið helst ikki undrar so nógv, tá ið vit vita, hvussu teir stóru felagsskapirnar virka, ið stjórna ítrótti og teimum milliardavirðum, ið fylgja við sjónvarpsrættindum og øðrum. Hetta er kent frá bæði OL, fótbólti og øðrum av altjóða og millumtjóða felagsskapunum, har tað gongur út uppá at keypa alt og øll fyri at fáa sítt ígjøgnum.

Men at føroyska uttanríkis- og mentamálaráðið, UMMR, eisini skal hava verið til so lítla hjálp í hesum høpi, kemur helst meira dátt við. Og júst vantandi stuðulin frá føroysku myndugleikunum kann enntá hava havt sína avgerandi ávirkan á, at tað hevur verið so lætt hjá EHF at fasthalda, at H71 átti at farið til Ukraina at spælt, hóast vandin fyri kríggi var ovurhondsstórur.

– Alt hetta málið byrjaði við, at sjálvur deildarstjórin í uttanríkis- og mentamálaráðnum seint fríggjakvøldið 11. februar 2022 – bara tveir dagar fyri dystin – ringdi til okkum og bað okkum um ikki at fara til Ukraina, hóast vit longu vóru í Pólandi og nærhendis ukrainska markinum. Hetta, tí boð vóru komin frá danska uttanríkisráðnum sama kvøld um, at danskir ríkisborgarar ikki máttu fara til Ukraina, greiðir Anna Dam frá.

– Men tá ið vit í sambandi við okkara samskifti við EHF í kærumálinum leitaðu okkum stuðul og hjálp frá uttanríkis- og mentamálaráðnum, tóku føroysku myndugleikarnir onga ábyrgd av tí, teir sjálvir aktivt høvdu gjørt, men góvu okkum bara eitt ónýtiligt skriv, har tað nú skuldi eita, at tey ikki mæltu til, at vit

fóru víðari. Í staðin fyri at standa við, at boð vóru givin um ikki at fara til Ukraina, fingu vit eitt stórt sæð einkissigandi skriv, sum ikki var í samsvari við veruleikan, at vit í roynd og veru fingu boð um at steðga á í Polandi. Hetta skrivið kunnu vit hvørki brúka til eitt ella annað, tí hetta var jú als ikki tað, tey gjørdu við at ringja til okkum – heldur enn at latið okkum sjálv funnið útav, hvørjum tilráðingum, vit vildu fylgt ella ikki.
Í samskiftinum frá EHF sæst nú eisini, at júst veiku orðingarnar og "afturtøkan" hjá uttanríkis- og mentamálaráðnum síggja út til at viga nógv í avgerðini hjá EHF, so her hava føroyskir myndugleikar heldur lagt fótonglar fyri H71 enn nakað annað. Heldur enn at hjálpt, hevur uttanríkis- og mentamálaráðið verið ein viðvirkandi orsøk til, at H71-kvinnurnar endaðu í hesari óhepnu støðu!
– Oman á tað heila kunnu vit so eisini staðfesta, at vit ongan góðan eiga í landsins leiðslu og so slett ikki í uttanríkis- og mentamálaráðnum, tí hóast alt hetta málið hevur kostað H71 í hundraðtúsundavís av krónum, er ikki eitt oyra frá landinum latið í stuðli, sigur Anna Dam.
– Vit sendu tvær identiskar umsóknir til Tórshavnar kommunu og uttanríkis- og mentamálaráðið. Kommunan viðgjørt umsóknina í skundi og játtaði okkum stuðul eftir mestsum ongari tíð, meðan uttanríkis- og mentamálaráðið brúkti vikur uppá at viðgera umsóknina, áðrenn vit fingu eitt noktandi svar um stuðul. Grundgevingin um vantandi heimild, sum UMMR tá brúkti, undrar okkum, tí vit eru kunnað um, at tað áður hevur játtað aðrari ítróttargrein stóran stuðul.

Kanska ikki við aftur

Alt hetta hevur tilsamans gjørt sítt til, at

H71-kvinnurnar vóru komnar næstan til ukrainska markið, tá ið deildarstjórin í føroyska uttanríkis- og mentamálaráðnum ringdi og bað tær ikki fara víðari, og so gingu dagar og tímar, uttan at nakað veruligt hendi. Síðani hevur akkurát eingin stuðul verið at heintað frá føroysku myndugleikunum

H71 kennir seg slept uppá fjall av bæði føroyskum myndugleikum og EHF. Sama kann tó ikki sigast um privatu stuðlar felagsins, ið hava stuðlað so dyggiliga. Enn hevur nevndin í H71 ikki viðgjørt, um farast skal víðari við eini kæru aftrat, har freistin er hálvan apríl, men Anna Dam sigur, at lítið talar fyri, at meira verður gjørt við málið.

– Eitt er tann fíggjarligi parturin, tí tað kostar okkum altso 37.000 krónur at kæra. Spurningurin er veruliga, um tað er tað vert, tá ið vit helst kunnu vænta okkum sama svar einaferð aftrat, tí eingin í EHF veruliga hevur áhuga fyri at loysa málið, men heldur at sleppa av við tað og sleppa víðari við kappingini, sigur hon.

– Fyri okkara viðkomandi snýr tað seg eisini um, um vit kunnu blíva við at brúka tíð og orku upp á eina slíka kæruviðgerð. Vit í H71 eru tíbetur væl fyri, tá ið tað kemur til juridiska vitan, so tí eru vit sloppin undan at skula út at keypa okkum hjálp, men eitt mark er eisini fyri, hvussu langt vit kunnu royna at toyggja málið. Annað er, at hálvfinalurnar verða spældar um vikuskiftið, so tí vildi verið ósannlíkt, at ein kæra kundi fört við sær, at H71 slapp upp í part aftur.

Ein avleiðing av málinum kann annars gerast, at H71 ikki orkar og tímir at fara upp í europeisku kappingarnar aftur, tá ið tað vísir seg ikki at vera ein jøvn skipan, tú tá ert partur av, men ein skipan, ið tekur atlit til tey stóru, so smá feløg ikki skulu vænta sær nakrar sum helst sømdir, skuldi aftur nakað líknandi sum hetta hent, ið hendi H71-kvinnunum.

– Av tí at EHF hevur víst seg at verið so stinkandi rotið, er veruliga ivasamt, um vit hava hug til at fara við aftur eina aðru ferð. Sum sagt, er tað ikki nógv, ið bendir á, at tey veruliga hava hug til at hava lond í europeiska útjaðaranum við í sínum kappingum. Tað er ið hvussu er tað, tey við viðgerðini av okkara kvinnum hava sent eitt øgiliga týðiligt signal um, sigur H71-forkvinnan.

– Í øllum førum er púra vist, at vit skulu umhugsa tað øgiliga væl, áðrenn vit aftur melda nakað lið til. Eg veit, at tað er stórt spell, nú H71-kvinnurnar stóðu seg so einastandandi væl og settu stórt fokus á føroyskan hondbólt, men tá ið tú kanst endað í støðu sum hesari og púrt eingin stuðul er at fáa frá EHF og ei heldur frá føroysku myndugleikunum, er neyðugt at umhugsa gjølla, um tað er tað heila vert.

Anna Dam, forkvinna í H71, hevur eftir viðferðina av kvinnuliðnum hjá felagnum mist álitið á EHF og er eisini sera vónbrotin av vantandi stuðli frá føroysku myndugleikunum, ið heldur hava forðað enn hjálpt í málinum.

TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
Flytur teg frameftir.

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
www.bilasolan.fo

Bilasølan
Vegurin Langi 43, 359700

FYRSTA PUNISKA STRÍÐIÐ LOKIÐ

Mynd: Álvur Haraldsen

Óli, ið saman við Pæturi var toppskjútti hjá monnunum í Klaksvík, roynir seg her við skoti ímóti Team Klaksvík.

Øll stúran, ið onkur kanska hevði undan ferðini til Klaksvíkar, har bæði kvinnurnar og menninir skuldu spæla fyrstu hálvfinalurnar í FM-kappingini, vórðu gjørdar til skammar, tí bæði okkara lið vunnu sannførandi sigrar.

So er fyrsta umfarið av hálvfinalunum lokið og sigast má, at fremstu lið okkara komu sera væl frá hesum fyrsta umfari. Bæði liðini skuldu sum kunnugt til Klaksvíkar at spæla og var soleiðis talan um eitt hondbóltsstríð millum høvuðsborgina fyri norðan, Klaksvík, og kanska nýggju høvuðsborgina í miðstaðarøkinum, Hoyvík – í øllum førum innan hondbólt.
Tað var ikki við sørt av bivan, at ein leitaði sær norður til Klaksvíkar mikukvøldið at fylgja fyrru hálvfinalunum ímillum H71 og Team Klaksvík hjá monnum og Stjørnuna hjá kvinnum, tí slíkir hálvfinaludystir eru ikki til at spáa um. Hóast tú kanska á pappírinum eigur at vinna, so er hetta als eingin trygd fyri, at gongdin kemur at fylgja tí – sum kunnugt gongur ikki altíð, sum prestur prædikar. Men longu frá fyrsta bríksli lótu spælarar okkara ongan iva vera um, at teir ætlaðu sær til Hoyvíkar við øllum.

Gott álopsspæl

Menninir spældu fyrst. Dysturin var í Badmintonhøllini og eftir stuttari løtu vóru vit á odda við fýra málum og minkaði munurin ongantíð aftur, men øktist stútt og støðugt til úrslitið 20-33, sum í sær sjálvum sigur ikki so lítið um dystin og styrkismunin hetta kvøldið. Tað var ein frægd at eygleiða ungu spælarar okkara, sum so leikandi lætt spældu seg ígjøgnum í álopinum. Ongantíð vóru teir ráðaleysir og sjáldan vóru teir fangaðir á skeiva beininum. At skjóta 33 mál í einum dysti borgar eisini fyri góðum álopsspæli. Í verjuni løgdu teir eisini kreftir í, og hóast spælararnir eru ungir – ja, enntá sera ungir – so bakkaðu teir á ongan hátt fyri eldru, størru og bulmiklaru spælarunum hjá Team Klaksvík. Samanumtikið var avrikið hjá monnunum framúr.

Tá ið ein sær hesa ungu stinnu manning okkara á fremsta mansliðinum ein slíkan dag, so ivast ein í, um vit nakrantíð hava havt eitt betri lið.

Tað tykist ikki at hava nakað veikt lið, hvørki í verju ella í álopi. Men vit mugu siga sum danir siga í ølreklamuni: “Nyd det lige så længe det varer” – havandi í huga, at liðini úti í heimi støðugt eru eftir ungu og evnaríku spælarum okkara.

Hesin hópurin er í so máta einki undantak. Óli Mittún fer til svenska meistarafelagið IK Savehof, Pauli Mittún fer til norska fyrstudeildarfelagið KRS í Kristiansand og málverjin Pauli Jacobsen fer til franska liðið JC Scherbourg, ið spælir í næstfremstu fronsku deildini.

Tað vil siga, at eftir hetta kappingarárið, standa vit aftur við fleiri avbjóðingum fyri liðið og skulu byggja nýtt upp. Men H71 hevur nú í fleiri ár sannað, at maður kemur í mans stað, tí hvørt ár er “selt” burtur av hópinum og nýtt hevur fólk hevur tikið við. Men væl er hilnast higartil.

Ikki eitt mál ov nógv!

Kvinnudysturin mikukvøldið gjørdist nakað tættari og meiri spennandi enn mansdysturin, sum helst eisini var væntandi. Kvinnurnar høvdu júst verið fyri teprum tapi í steypafinaluni um vikuskiftið og skuldu tær líkasum upp á hestin aftur.

Ein kundi tí frykta fyri, at hetta fór at darva spælið hjá kvinnunum. Men tað gjørdist tó als eingin trupulleiki. Alt frá byrjan settu kvinnur okkara seg í førarasætið í dystinum, og mátti Stjørnan allan dystin halta aftaná og royna at hanga í.

Stórur munur var ikki fyrra partin av dystinum, tá liðini fylgdust nøkulunda, men tá komið var út ímóti hálvleiki dragnaði veruliga og kundu vit fara til hálvleiks við eini fimmmáls leiðslu. Í seinna hálvleiki tóku kvinnur okkara við, har tær høvdu slept tá farið var til hálvleiks, og løgdu seg framum við heili átta málum fyrst í

øðrum hálvleiki. Tað eydnaðist tó Stjørnuni at minka nakað um munin, men tá avtornaði, høvdu vit vunnið við seks málum. Og tað var ikki eitt mál ov nógv! Kvinnur okkara vóru so dyggiliga omaná allan dystin. Serliga í álopinum gekk væl, men verjan stóð seg eisini væl. Og tey hol í verjuni, sum vit sóu til steypafinaluna, høvdu tær tipt. Eitt megnar avrik hjá kvinnunum!

Nú eru so hálvfinalur aftur sunnudagin, og tá er at vóna, at spælarar okkara halda fram, har teir sleptu í Klaksvík. Sum kunnugt vóru punisku stríðini trý, áðrenn Rómararíkið hevði lagt Kartago oyði. Vónandi skulu vit bert uppliva tvey stríð hetta hálvfinaluumfarið… Livst so spyrst!

KOYR Á HOYVÍK

Mynd: Hilmar Jan Hansen

Maria bjóðar verjuni hjá Stjørnuni av í dystinum mikukvøldið, meðan Vár sær øgiliga klár út inni á strikuni.

EISINI SELJA VIT

- Vaflur
- Køkur
- Te / Kaffi
- o.a.

SPÆLILAND

LOPPU-MARKNAÐUR

Keyp borð fyri 250 kr.

Ring 219244 ella skriva til dalsgaard74@gmail.com

UPPLESTUR

Til børn

TOMBOLA OG LUTASEÐLAR

BIOGRAFUR

Við poppcorn og slush-ice

FAMILJUTILTAK

Í SKÚLANUM VIÐ LØGMANNABREYT

2. APRÍL - KL. 10-16

Tiltakið er innsavningartiltak til frama fyri Partille Cup hjá H71.

H71

NORÐOYA SPARIKASSI

Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging

Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 475000 ns@ns.fo ns.fo

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO

Vit raka málið!

Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!
MBM

OLIVER JOENSEN

GONGD KOM Á HONDBÓLTIN Í KLAKSVÍK, TÁ KÍ-HØLLIN KOM

(Mynd: Oliver Joensen/Norðlýsið)

Durita Christophersen Jojic, Tóra Eliasen og Malene Madsen ansa væl eftir okkara Vár í dystinum í Klaksvík mikukvøldið.

Stjørnan vann seks meistaraheiti og seks steypakappingar millum 2000 og 2010, men nú sær aftur ljósari út hjá felagnum, eftir at tað hevur verið í einum aldudali, heldur fyrrverandi blaðstjórin á Norðlýsinum.

Hondbóltsfelagið Stjørnan er eitt gamalt felag, men tað er ikki heilt greitt akkurát, nær felagið er stovnað. Í bókini "Bóltspøl millum Klakk og Kjøl", sum Árni Dahl hevur skrivað, stendur, at Stjørnan helst er stovnað í 1932, og vóru tað nakrar ungar gentur, sum settu felagið á stovn. Til stuttleika kann nevnast, at Árni millum annað skrivar, at fyrsti leikbúnin var ein hvítur heimaseymaður kjóli.
Í yvirlitinum hjá Hondbóltssamandi Føroya yvir føroyameistarar hjá kvinnum, sum er frá 1943 og til dagin í dag, stendur, at Stjørnan fyrstu ferð er føroyameistari í 1945.
Seinni fóru menn eisini at spæla hondbólt, og vóru tað fyri tað mesta fótbóltsspælarar hjá KÍ, sum eisini leiktu hondbólt.
Tað er ikki fyrrenn KÍ-høllin kemur, at rættulig gongd kemur á hondbóltin í Klaksvík, bæði hjá kvinnum og monnum. KÍ-høllin varð, sum tann fyrsta ítróttarhøllin í landinum, tikin í brúk í 1969.

Vann nógv fyrst í øldini

Serliga virkið var felagið í 80'unum og 90'unum. Men kappingin um ungdómin var hørð – serliga vóru tað dreingirnir, ið høvdu betur hug at spæla fótbóltbólt, og tað hevði við sær, at felagið gjørdi av at niðurleggja mannfólkadeildina.

Tað er eingin loyna, at tað gjøgnum tíðirnar hava verið kvinnurnar, sum hava verið stoltleikin hjá felagnum. Í tíðarskeiðinum frá 2000 til 2010 vunnu kvinnurnar hjá Stjørnuni seks FM-heiti, umframt at tær hesi árini eisini seks ferðir vórðu steypavinnarar.

Upp úr aldudalinum

Tað gongur upp og niður, og seinnu árini hevur Stjørnan verið í einum aldudali, men nú sær ljósari út. Felagið hevur eina vælvirkandi nevnd, sum undan hesum kappingarárinum setti sær fyri, at felagið vildi verða, har tað er stuttligt at vera. Millum annað var málsetningurin, at besta kvinnuliðið skuldi verða millum topp fýra, og tann málsetningur er náddur.

Ikki sørt av spenningi er um dystin í dag. Ásannast má úr sjónarhorninum her í Klaksvík, at H71 so rudduliga var omaná til dystin í Klaksvík.

Men kappingarskipanin sigur, at tað skulu leikast minst tvinnir dystir. Málmunurin frá fyrra dystinum kann tí ikki brúkast til annað hjá H71, enn at støðan er 1-0 til H71. Vinna vit í kvøld, so er støðan 1-1, og tá skal ein dystur leikast afturat.

Stjørnan fer sjálvandi eftir sigrinum í dag, so lagt er upp til eina spennandi hondbóltsuppliving.

Góðan dyst!

Mynd: Hilmar Jan Hansen

Oliver Joensen, fyrrverandi blaðstjóri á Norðlýsinum, hevur millum ár og dag fylgt ítróttinum í Klaksvík, og ikki minst hevur hann sæð nógvar dystir hjá Stjørnuni – og gjarna við myndatólinum um hálsin, sum her mikukvøldið.

Myndin hjá Sosialinum...

Tvær myndir í sama sekundi! So sjáldsamt kann tað vera, tá ið tveir myndamenn eru til sama dyst, sum Oliver Joensen frá Norðlýsinum og Hilmar Jan Hansen frá Sosialinum vóru tað í november 2009, tá ið báðir vóru til ein dyst í Vestmanna millum VÍF og Stjørnuna. Í tí eina førinum, tá ið Joan Midjord Joensen leyp inn av strikuni, trýstu báðir á knøttin í senn – og burtur úr tí komu tvær myndir av somu støðu…

...og myndin hjá Norðlýsinum

AnnaJanni
FOKUS
18:29
Lætt og stuttligt
Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta
ss.fo
SUÐUROYAR SPARIKASSI

BANKNORDIK

Landsliðsleikari í ein dag

við Peter Bredsdorff-Larsen

Vinn eina persónliga venjing
- fyri teg og ein vin

Hitt A-landsliðið

Eftir venjingina sleppa tit at heilsa uppá føroyska A-landsliðið hjá monnum og fáa eisini atgongumerki til landsdystin millum Føroyar og Hvítarussland í mars.

Soleiðis gert tú

Tú kanst antin gera ein stuttan film, har tú fortelur, hví tú vilt vinna, ella gera tað skrivliga í seinasta lagi 9. mars.

Les meira og send inn á
banknordik.fo/hondboltur

Meira enn ein banki

1	Rúna Jógvansdóttir Larsen
2	Elsa Egholm
5	Vár Bentsdóttir Zachariasen
6	Bjørk Brimnes
7	Maria Halsdóttir Weyhe
8	Karina Eysturtún Rubeksen
9	Brynhild Pálsdóttir
10	Eva Barba Arge
12	Alda av Skarði
14	Inga Maria Joensen
16	Simona Michelsen Kass
17	Lív Bentsdóttir Zachariasen
18	Rannvá Olsen
25	Sára Jacobsen
28	Lukka Arge
77	Jana Mittún
88	Marita Mortensen
99	Guðrið á Borg

Venjari:	Mark Marcher Lausen
Venjari:	Ingi Olsen
Liðleiðari:	Sunniva Bogadóttir
Málmansvenjari:	Jóhan Hofgaard
Fysiskur venjari:	Heri Ziska
Fysioterapeut:	Ári Jógvansson Olsen

SMS KAPPINGIN - KVINNUR

Nr.:	Lið:	Dystir	V.M	T.M	Munur	Stig
1.	**H71**	**18**	**544**	**454**	**90**	**33**
2.	Kyndil	18	525	411	114	28
3.	Neistin	18	471	413	58	22
4.	Stjørnan	18	527	436	91	21
5.	Stíf	18	433	433	0	13
6.	VB	18	396	522	-126	7
7.	EB	18	354	581	-227	2

1	Ári Egason Dam
2	Sveinur Olafsson
5	Pauli Mittún
8	Pætur Thomsen
9	Jón Rói Mohr Høgnesen
10	Djóni Gaard Joensen
11	Hans Kári Hansen
16	Pauli Jacobsen
18	Sakir T. Frýdal
24	Pætur Mikkjalsson
26	John Skaalum Vilhelm
26	Janus Dam Djurhuus
28	Rói Ellefsen á Skipagøtu
30	Poul Símun í Garði
39	Rókur Ziskason
45	Peter Krogh

Venjari:	Simon Olsen
Venjari:	Petur Mittún
Málmansvenjari:	Jens á Skipagøtu
Fysiskur venjari:	Heri Ziska
Fysioterapeut:	Ári Jógvansson Olsen
Liðleiðari:	Petur O.Sivertsen

BURN
FITNESS

BURN KAPPINGIN - MENN

Nr.:	Lið:	Dystir	V.M	T.M	Munur	Stig
1.	**H71**	**18**	**571**	**434**	**137**	**32**
2.	Kíf	18	504	456	48	26
3.	Víf	18	507	469	38	20
4.	Team Kl.	18	495	524	-29	17
5.	Stíf	18	491	563	-72	11
6.	Neistin	18	500	531	-31	10
7.	Kyndil	18	421	512	-91	10


WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
WENZEL.FO

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«

ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN

H71 TIL PARTILLE CUP

Saman við 25.000 øðrum fara 135 ungir hondbóltsspælarar úr H71 til Partille Cup í summar.

Í fjørsummar var ætlanin, at H71 skuldi vera við í heimsins størstu hondbóltskapping, Partille Cup í Göteborg í Svøríki, men hesum fekk koronufarsóttin forðað fyri.
Men nú er avgjørt, at farast skal avstað til Partille Cup í summar í staðin, og fyrireikingarnar eru í gongd. Heili 135 spælarar hava meldað seg til, umframt at nógv foreldur og systkin eisini fara við til Svøríkis.
Sum vera man, eru øll sera spent at vera við í stóru kappingini, sum verður frá 5. til 10. juli, og væntandi verða einir 25.000 hondbóltsspælarar við í ár.
Hondbóltskappingin í yngru deildunum endar nú um vikuskiftið, og nú halda okkara leikarar ein lítlan steðg. Men fyrstu viku í apríl byrjar kropsliga venjingin aftur hjá teimum, sum eru U14, og so byrja vit við summarvenjing fyrst í mai mánaði, so vit eru væl fyrireikað til Partille Cup.
Ymisk tiltøk verða hildin, so tað peningur skal verða savnaður inn til teirra, ið skulu avstað, og í vikuni hava vit selt fisk frá Norðfra.
Leygardagin 2. apríl verður eitt stórt familjutiltak í Skúlanum við Løgmannbreyt, og týsdagin 19. apríl, beint eftir páskir, koma okkara spælarar runt í húsini í Hoyvík at vita, um tit eiga tómar fløskur at lata teimum.

FAROE SHIP

VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til *HITA*
SANITET &
VENTILATIÓN

Maria Poulsen & Co

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000

HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

Mynd: Gudmund Helmsdal

LAIDERZ

Fokus på sportsfaciliteter

HOYVIKSVØLLURIN

Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.

JUTA MASTER 40/200 á EL25

www.laiderz.dk

OKKARA KJARNUØKI

GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD

Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

januar
LØGGILT GRANNSKODANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

Tak appina
niður her

Fyll á og
koyr víðari

effo
appin

ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!

J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399

Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn

Et her, tak við ella bílegg

mál

Máltíð til børn & vaksin

Salatbarr **Kaffi** *Tvíflísar*

Smurd rundstykkir

10 Miðal salatir

350,-

Spar 50 kr

Karlamagnusarbreyt 16A, Hoyvík, tel. 588256

Frítíðin byrjar umborð

Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD
RAISED IN THE WILD

hiddenfjord.com

SISU
SKORA
VIÐ
SISU

Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartídir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Fríggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt

ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo

REINAR TENN BRENNA IKKI